# Nøvn

## Minningarorð frá Javnaðarflokkinum um Jonathan Motzfeldt

Hósdagin 28. oktober í ár andaðist Jonathan Motzfeldt í Nuuk 72 ára gamal. Við deyða Jonathans hevur grønlendska tjóðin mist ein av sínum stóru synum.

Jonathan Motzfeldt gjørdist longu sum ungur undangongumaður í grønlendskum politikki og var í mong ár formaður í flokkinum Siumut, sum tey fyrstu mongu árini var stjórnarberandi flokkurin í Grønlandi. Hann hevði stórar visiónir fyri grønlendsku tjóðina. Grønland skuldi hava sjálvstýri og grønlendska sjálvstýrið skuldi áhaldandi útbyggjast og mennast. Landið skuldi gerast eitt vælferðarsamfelag eftir egnum fortreytum og Grønland skuldi taka sess millum ikki bert norðurlendsku tjóðirnar men millum allar heimsins tjóðir.

Men Jonathan hevði tí ikki bert áhuga fyri menningini av grønlendsku tjóðini, hann hevði stóran áhuga fyri umstøðunum hjá heimsins upprunafólkum sum heild og í hesum høpi serstakliga lagnuni hjá Inuit, arktisku upprunatjóðunum. Hann sýndi hesum tjóðum stóran áhuga og stórt samhaldsfesti og átti eisini stóra virðing millum hesar tjóðir.

Jonathan Motzfeldt var eisini virkin og hátt mettur í norðurlendskum samstarvi og tá Jonathan tók orðið á norðurlendskum fundum, varð lurtað við áhuga og virðing. Hann legði stóran dent á at breiða út kunnleika í altjóðasamfelagnum til føðiland sítt, og hann dugdi framúr væl



at kunna um Grønland og skapa fatan fyri serstøku landfrøðiligu, mentanarligu og vinnuligu viðurskiftunum í landinum.

Jonathan Motzfeldt var ikki bert eitt gott umboð fyri føðiland sítt Grønland, men hann var eisini eitt gott umboð fyri okkum, tjóðirnar, í Útnorði og fáur dugdi sum hann at greiða frá og at lýsa tær kringumstøður og tær fortreytir, sum eyðkenna lívskor okkara, sum búleikast í Útnorði.

Tað, sum stútt og støðugt lá fremst í huga Jonathans, var áhugamál grønlendsku tjóðarinar. Hann legði nógv fyri, tá tað ráddi um at verja hesi áhugamál og vann hann sær nógva virðing úti sum heima fyri sítt stríð, sítt áhaldni og sítt støðufesti, tá tað ráddi um at verja grønlendsk áhugamál.

Jonathan Motzfeldt átti nógvar vinir í Føroyum og við honum hava vit mist ein av okkara bestu vinum í útnorður- og norðurlendskum samstarvi. Hann hevði gott samband við Javnaðarflokkin, og vit í flokkinum fara at sakna hann. Vit hava størstu virðing fyri honum persónliga so væl sum fyri politiska lívsverki hansara. Vit fara at minnast Jonathan Motzfeldt sum ein góðan og vinsælan samstarvspart í mongum viðurskiftum, har vit høvdu felags áhugamál. Vit fara at minnast hann sum ein virðiligan, góðan og sterkan umboðsmann fyri Grønland, fyri tjóðirnar í Útnorði og fyri Inuit í Arktis. Vit lýsa frið yvir stóra hugsjónarmannin og politikkaran Jonathan Motzfeldt.

**Jóannes Eidesgaard**

---

hjá sýslumanninum, og tá ið omma eitt kvøldið var bjóðað til nátturða hjá teimum, bað hann hana fortelja eina søgu fyri børnunum, meðan hann skuldi hyggja at. Tá ið hon var liðug, segði hann væl nøgdur, "Nú forstandi eg væl, hví at børnini eru so trygg, tá ið tey lurta eftir søgu hjá tær".

Ja, hetta við at fortelja søgur, var "dagligur kostur" í Norðradali, tá ið tað strangasta arbeiði var av, og ein fríløta spurdist burturúr. Andrias abbin dugdi eisini væl at fortelja, men hansara søgur vóru sovorðnar ræðusøgur, sum fingu barnahjørtuni upp at pipra. Sum heild eyðkendi forteljing og forvitni bygdafólk.

Eina ferð vitjaði elsti sonur ommu, Jóannes, gummuna og abban í Norðradali sum smádrongur. Tá lá gumman fyri tað mesta í songini, og sum tann lítli Jóannes lyfti dýnuna upp hjá henni, læt í honum, "hendan gumman HEVUR bein!!!". Hann trúði helst, at hon lá har við ongum beinum. Omma greiðir soleiðis frá: "Tað hildu tey vera grúuliga stuttligt, sovorðið livdu tey uppá, forskellig sovorðin smáting, tá ið man er úti á bygd, tá leggur man so væl merki til, tá ið okkurt sovorðið stuttligt verður sagt".

Eg kundi hildið á í tímavís at endurfortalt søgur og upplivingar, sum ommu hava verið fyri, m.a. um tann stuttliga spillopparan, fosturbeiggjan Erlot, sum altíð fann upp á okkurt "puss" í skúlanum og heima (skúlagongd var bert fjórðu hvørja viku). Eina ferð hevði hann stappað draktina hjá sær út, og lagt hana hálva út ígjøgnum vindeygað. Myrkt var inni, og tá ið gumman kom inn í kamarið, byrjaði hon at rópa av ræðslu, "Á Jesus, Erlot!!! Far ikki út um vindeygað!!!!!" Ímeðan gumman var um at svíma av ræðslu, stóðu systkini í onkrum avkróki og hildu hetta vera øgiliga stuttligt.

Mangar eru søgurnar um henda Erlot og aðrar legendariskar verur í Norðradali, men eitt víðari framhald verður at síggja og hoyra, tá ið tær umtalaðu upptøkurnar koma út á band.

### Kærleikin meldar seg

Undir krígnum kom omma í samband við teir galantu eingilsmenninar, sum við tyggigummum, sjokulátu og temunnum gjørdust væl umtóktir ímillum tær føroysku kvinnurnar. Omma sat eina ferð á motorsúkkluni hjá tí eina og rópti á føraran, "Not so quickly". Men eingin maður hevði enn klárað at ogna sær ommusa hjarta, og tað skuldi ganga nøkur ár, áðrenn prinsurin á tí hvíta hestinum kom framvið.

Abbi og omma hittu hvønn annan, tá ið omma kom til Klaksvíkar at búgva. Líggjas á Váli, abbi mín, og omma sungu bæði við í Betesda kórinum, men sum omma sigur frá, "hann snakkaði ikki við meg, og eg snakkaði ikki við hann". Har var tó okkurt í luftini, tá ið ein kvinna í kórinum, Amalja, argandi segði, "Á je, Anna, tað hevði nú verið doyligt, høvdu Líggjas og tú komið saman, hugsa tær til – Á, tær songrøddir!" Omma varð so flóv tá, men nú sær hon sjálvandi, at hendan hevði rætt – børnini blivu sangarar uttan líka.

Eftir kríggið, í 1946, fór omma fyri fyrstu ferð uttanlands. Tað var við gamla tjaldrinum. Hon kom at tæna á einum garði í Jyllandi. Her royndi hon at súkkla á fyrstu sinni, men tað gekk so ógvusliga fyri seg, at tað eisini gjørdist síðstu ferð, at hon steig upp á eina súkklu, jú jú, inníjgjøgnum eitt hegn, kýrnar út á vegnum, og so ímillum tveir stórar steinar. Omma hevur sagt mær, at hevði hon ikki verið so "heldig í óheldinum", so veit hon ikki, um hon hevði staðið her í dag.

Aftur til kærleikan. Omma var leingi forlipt uppi í Líggjasi. Hon tekur soleiðis til, um tá ið pláturnar við Líggjasi sum sangara komu út, "tá mátti mann næstan halda sær fast, fyri ikki at detta niður á gólvið, tí at knøini blivu sum smør". Eitt kvøldið bar tað seg so á, at omma og vinkonan Ninna gingu túr aftan á eitt møti. Tá ið tær so skiltust, og omma helt fram niðan gjøgnum brekkuna, nú hoyrir hon, at onkur kemur aftan á henni. Hon hugsaði bara, at Líggjas ætlaði sær eftir vinkonuni Ninnu, men so vendir hon sær á og sær, at hann kemur ímóti sær. Har stóð hon so, og visti ikki, um hon skuldi steðga á, ella halda fram niðan har, sum hon búði. Men so sleyg tankin hana, at "vissi Líggjas kemur aftan á mær, so meinar hann tað... tí at hann fer ikki aftan á eini gentu, sum hann einki meinar við.. Og meinar hann tað, og eg renni undan, so kemur hann ongantíð aftur. Tað var eg klár yvir. So eg steðgaði á.... vit møttust har. Og liðugt var – tað var RÆÐULIGA SPENNANDI løta". Hetta hevur omma ongantíð angrað, og tað hevur sambært henni verið gott allan vegin. Omma hevur lagt afturat í samrøðuni, at eg og hon høvdu ikki kunnað prátað saman, um tað ikki blivu tey bæði. Og tað er omma Gudi glað og takksom fyri soleiðis, sum Hann hevur ornað tað.

### Tillukku Omma

Lagnan er duldarfull. Og ommusa ævintýr steðgar ikki her. Síðani síðstnevnda "brakið" hevur hon upplivað tað at fáa børn og ommubørn, ja, hon hevur upplivað heili trýss ár afturat hesum ávísa romantiska vetrarkvøldinum í januar – og upplivir enn.

Nógv hava notið av hennara gávumildni og tænastu og verki fyri Harran. Drýlar, bollar og kleynur hava sirkulerað runt allastaðnis. Omma elskar at geva og gleða onnur, hon hevur eitt stórt og heitt hjarta, so eg meini, at hon so væl og virðiliga hevur uppiborið mína "Brockmanns" føðingardagsheilsan her í blaðnum. Og tá ið omma ger eina máltíð, so koyrir hon eina ingrediens í, sum ger allan munin, og tað er kærleiki – fleiri kilo av honum!

So mín elskaða Omma, hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegnum, túsund takk fyri alt, sum tú hevur verið og ert fyri meg, hóast eg nú búleikist sum ein banditt í Frankaríki, har ið omma eitur "Grand-Mère" (sum tú ikki brýggjar teg so nógv um). Jesus signi teg og styrki teg á lívsleið tíni. Eg eri tíverri burturstaddur á tínum runda føðingardegi, men bara rólig, eg skal nokk møta upp, tá ið tú fyllir 100. Omma leingi livi: Hurrá x 90 !!!

**Napoleon Smith,**
23 ár,
03.11.10 Aix-en-Provence